*Finn Mikkelsen frá danska dopingeftirlitinum:*

# Ansast má eftir

*Á ársfundinum hjá Rúsdrekka- og Narkotikaráðnum í fjør helt Finn Mikkelsen frá dopingeftirlitinum hjá Team Danmark áhugaverdan fyrilestur um doping innan ítróttin. Nú skal Ítróttasambandið á aðalfundinum leygardagin umrøða evnið, og ætlanin er at fáa samtyktar lógarbroytingar, sum heimila doping-eftirlitið av føroyskum ítróttafólkum.*

Sofus Johannesen

Tað eru fleiri orsøkir til, at doping ikki á nakran hátt verður góðtikið innan ítróttin.

Fyri tað fyrsta er doping heilsuskaðiligt, og harnæst koma eisinini etiskar orsøkir, tí tað er snýt at vinna kappingar, eftir at nýta dopingevnir. Umframt tað teljast eisini støðan til sivilar lógir eins og aðrar samfelagsligar orsøkir.

Fyri at royna at koma dopingini til lívs skipar ítrótturin saman við stjórnunum í teimum ymisku londunum fyri eftirliti við ítróttarfólkunum, eins og framhaldandi gransking fer fram fyri at finna fram til kanningarháttir, ið eru mest effektivir at avdúka nýtslu av ólógligum evnum.

**Doping**

Doping er stutt sagt tað, at eitt ítróttarfólk tekur stimbrandi evnir, fyri at klára seg betur í einari kapping.

IOC - Altjóða Olympiska Nevndin - hevur ein lista við teimum evnum, sum ikki eru loyvd at nýta í samband við ítróttakapping, ella ítróttavenjingar yvirhøvur.

Fyri at kanna eftir, um ein íðkandi hevur nýtt nakað av hesum evnum, skipa ítróttasamgongur fyri eftirliti við landroynd ella blóðroynd, sum tann íðkandi uttan ávaring verður biðin um at geva.

Noktar ítróttafólkið at geva tílíkar land- ella blóðroyndir, verður ítróttarfólkið revsað sum um tað er avdúkað at hava nýtt ólóglig evnir.

Vanliga revsingin fyri at vera avdúkaður í eini dopingroynd er at ítróttarfólkið verður útihýst frá øllum ítrótti í 2 ár. Verður eitt ítróttarfólk avdúkað 2. ferð hevur tað burturvísing við sær, t.v.s. at ítróttarfólkið ikki sleppur at íðka ella kappast aftur.

**Team Danmark**

Í Danmark er tað Team Danmark, sum skipar fyri dopingeftirliti.

Har verða ítróttarfólk kannaði í ítróttarfeløgunum og vanliga býtið av kanningunum er, at umleið 60 % av kanningunum verða gjørdar undir venjing, meðan 40 % verða gjørdar undir kapping.

Ymiskt er, hvørjar ítróttagreinir verða mest kannaðar. Finn Mikkelsen sigur, at í Danmark verða nógvar royndir gjørdar innan súkkling, frælsan ítrótt, svimjing og styrkiítrótti yvirhøvur. - Men stórur dentur verður lagdur á, at ongin skal kenna seg tryggan við at nýta doping. Tí verða royndir av og á gjørdar innan allar ítróttagreinir. Ítróttafólk ella felagsskapir kunnu eisini sjálvi biðja um at verða kannaði.

Norðurlendsku ítróttasambondini hava gjørt avtalu sínamillum, so í t.d. Danmark kunnu tey eisini kanna allar norðurlendingar, sum venja ella kappast í Danmark. Eisini eru avtalur við onnur lond.

Í royndunum at basa doping samstarvar Team Danmark við marknaløgregluna, Toll- og Skattstovuna, apotekini og heilsuverkið.

Um ein tikin roynd er positiv, fer málið til dopingnevndina, sum fellur dóm. Hesin dómur kann appellerast til ein ítróttadómstól.

**Dopingroyndin**

Dopingeftirlit verður eisini gjørt fyri at ávara íðkandi. Endamálið er eisini at verja tey, ið ikki nýta ólóglig evnir, men so sanniliga eisini at taka tey, ið snýta.

Dopingeftirlitsfólinin koma uttan at hava boðað frá frammanundan. Tað eru 2 ella 3 eftirlitsfólk, sum møta upp til venjing ella kapping. Kanningin verður gjørd undir strangum eftirliti fyri at tryggja sær rættar royndir. Ítróttarfólkið skal lata land í 2 gløs, eina A-roynd og eina B-roynd. Sama nummar verður skrivað á báðar royndirnar, og tær verða so læstar niður í ein kassa. Ítróttarfólkið upplýsir síðani eftirlitsfólkunum hvørjar tablettir og vitaminir, tey hava tikið teir seinastu 4 dagarnar.

Síðani verður royndin kannað. Tað er glasið við A-royndini, ið verður kannað, og bert um ólóglig evnir verða funnin í A-royndini verður B-royndin eisini kannað. Tað er fyri at vera heilt vísur í, at royndin er positiv, at tvær royndir verða kannaðar. Er A-royndin negativ, verður B-royndin koyrd vekk, og onki meira verður gjørt. Eru báðar royndirnar hinvegin positivar, verður ítróttarfólkið revsað.

Tað eru umleið 600 evnir á listanum yvir ólóglig evnir.

**2,5 % positivar**

Í altjóða høpi vístu hagtøl, at í 1986 vóru 2,5 % av tiknu royndunum positivar.

Men eftir skandaluna við Ben Johnson, sum varð avdúkaður sum snýtari undir Olympisku leikunum, fall talið á positivum royndum.

Men síðani er talið so spakuliga hækkað aftur, og nú nærkast positivu royndirnar aftur 2 %. Í Danmark hava tey seinastu 5-6 árini umleið 1 % av royndunum verið positivar.

Í tíðarskeiðnum 1980 til 1998 eru í Danmark 33 positivar royndir funnar innan styrkilyfting, 22 innan vektlyfting og 10 innan súkkling. Í hinum ítróttagreinunum hava verið færri, men innan flestu greinar eru positivar royndir funnar.

**Hví nýta doping**

Men hví nýta ítróttarfólk doping, tá tað er so heilsuskaðiligt?

Finn Mikkelsen sigur, at orsøkirnar til tess eru fleiri. Hesi ólógligu evnini geva styrkivøkstur, fíggjarlig og psykologiskar orsøkir eru eisini, umframt at bólkatrýst og økt ambitiónsstøði hava stóra ávirkan á nýtsluna av ólógligu evnunum. Ein kanning í Danmark í 1997 vísti, at 3 % av ítróttarfólkunum høvdu nýtt ólóglig evnir.

**Hvat kann gerast**

Spurningurin er so, hvat kann gerast fyri at koma doping til lívs.

-Eitt tað týdningarmesta í hesum høpi er, at venjarar hava eina støðu til doping, sigur Finn Mikkelsen. -Harafturat skal ansast eftir teimum, sum venja einsamøll í „doping-belastaðum“ umhvørvi.

Ítróttarfólk sulu ikki nýta evnir, tablettir ella líknandi uttan at spyrja lækna, apotek ella at kanna, um evnið er á dopinglistanum hjá IOC. Meira tilfar um doping fæst m.a. á internet heimasíðuni: www.doping.dk.

**EPO**

Eitt evnið, ið er nógv at hoyra um í hesum døgum, serliga innan altjóða súkkluítróttin, er EPO.

EPO er eitt hormon, sum verður gjørt í nýrunum, og sum ger fólk kvikari og sterkari. Hetta er ein dýr viðgerð, ið kostar einar 6.000 kr. um vikuna.

Tað er ikki gjørligt í dag at avdúka hetta evnið, men ábendingar fáast við at mála hæmatokritvirði. Vanliga virði hjá einum persóni eru 43 , men er hetta virðið omanfyri 50 verður íðkarin roknaður sum dopaður við EPO.

Men hetta er eitt sera vandamikið evnið, og ikki færri enn 14 deyðsføll vóru í Hollandi og Belgia seinast í áttati árunum. Í 1995 boða italiumenn frá, at EPO nýtslan har er ovurhonds stór. Á apotekunum har var EPO triðj mest selda evnið, og sjálvt foreldur at juniorum kravdu av venjarunum, at teir góvu børnunum EPO.

**Vandabólkarnir**

Finn Mikkelsen greiðir frá, at í Danmark verða størstu vandabólkarnir innan doping roknaðir sum „Body-building“ og kappingar hjá sterkum monnum.

Men hesar kappingar eru uttan fyri ítróttasambandið, so tær verða ikki doping-kannaðar. Vektlyfting er eisini millum tær ítróttagreinir, har doping er mest vanlig, men tað er bert í Finlandi av norðanlondum, har vektlyfting ikki er innan ítróttarsambandið, so í hinum norðanlondunum verða vektlyftarar kannaðir.

Finn Mikkelsen leggur stóran dent á at ansa væl eftir og kanna ítróttarfólk, sum venja saman við „Body-buildarum“ og sterkum monnum, sum fjala seg í feløgum, ið ikki eru í skipaðu ítróttarsamgongunum og harvið ikki eru undir dopingeftirliti.



*Nýggi formaðurin hjá Fimleikasambandinum eitur Elin H. Joensen*

***Mynd: SJ***

# Elin nýggjur formaður

*Elin H. Joensen varð leygardagin vald til formann í Fimleikasambandinum*

Fimleikasambandið hevði aðalfund leygardagin. Hetta gjørdist ein fámentur fundur, tí bert 4 av teimum 7 fimleikafeløgunum í landinum møttu. Men um tað var tað góða veðrið ella lítil áhugi, ið var orsøkin til fámenta fundin, skal ikki verða gitt um her.

Fimleikasambandið fekk nýggjar lógir í september 1998, og síðani tá hevur sersambandið verið stýrt av einari 7-manna nevnd, har hvør nevndarlimur hevur sína uppgávu. Hendan nevndin sá soleiðis út: Andrias Lamhauge, formaður, Marit H. Petersen, kassameistari, Haraldur Kjeld, reiðskapur, Dagbjørt S. Hansen, stórkapping, Bára S. Thomsen, fimleikadagar og fagnaður, Beinta Danielsen, skeið og døming, og Jacobina N. Petersen, landslið og uttanlandsferðir.

Av hesum 7 ynsktu bert tvey at halda fram, meðan 5 løgdu frá sær.

Áhugin fyri at koma í nevnd hjá Fimleikasambandinum sær ikki út at vera stórur, tí fyri hesi 5 eydnaðist tað bert at manna formanssessin. Ein eykaaðalfundum má so til fyri at manna restina av nevndini.

Nýggjur formaður í Føroya Fimleikasambandi er Elin H. Joensen, sum eisini er formaður í Havnar Fimleikafelag. Hinir nevndarlimirnir, ið halda fram, eru Marit H. Petersen, kassameistari, og Beinta Danielsen, ið stendur fyri skeiðum og døming.

Frá Fimleikasambandinum frætta vit, at eykaaðalfundur væntandi verður um ein mánað.

SJ

# Gullið tættari undir borðinum

*Sperligan: At Brøndby bara megnaði javnleik í Silkeborg hevur við sær, at støðan hjá Herfølge sum oddalið styrknaði uppaftur meiri*

Jákup Mikkelsen og liðfelagarnir í Herfølge vóru við hús mánakvøldið. Teir fylgdu við í TV3+, hvussu tað gekk hjá Brøndby, sum í Silkeborg stríddist fyri at halda tørn um lítla munin upp til Herfølge á fremsta plássinum.

Sjálvandi tóku Jákup Mikkelsen og liðfelagarnir á við Silkeborg. Og hóast teir ikki spældu, so royndist mánakvøldið væl hjá Herfølge.

Uppgerðin í Silkeborg endaði 1–1, og tað hevur við sær, at nú tað resta trý umfør av donsku kappingini, er Herfølge á odda við 53 stigum, meðan Brøndby á øðrum plássi hevur 50 stig.

Silkeborg kom á odda í 9. minutti, og teir raktu í stólpan aftanfyri Mogens Krogh, áðrenn Brøndby javnaði í 38. minutti. Myrki Godwin Attram skoraði fyri heimaliðið, og leigusveinurin Peter Møller javnaði fyri Brøndby. Peter Møller fekk møguleikan millum teir fyrstu ellivu, tí veteranurin Bent Christensen, sum við trettan málum er toppskjútti hjá Brøndby, var til prívtøku. Hann lesur jura í Keypmannahavn og venur bara helvtina av tí, sum hinir venja.

Fram móti dystarenda stóð nógv á frammanfyri bæði málini. Brøndby flutti fólkið langt fram, tí teir vildu hava sigursmálið fyri at varðveita støðuna eitt stig aftanfyri Herfølge. Álopskendi hugburðurin hevði við sær, at Silkeborg fekk fleiri møguleikar at skora í snarálopum, men einki mál kom í 2. hálvleiki.

Sjálvandi frøddust teir í Herfølge, og nú eru tey alt fleiri, sum rokna við, at lítla felagið við stóra fótbóltsliðnum fer at vinna DM. Sunnudagin fær Brøndby vitjan av FCK, meðan Herfølge fær vitjan av OB.

Um støðan eftir tey 33 umførini skuldi verið soleiðis, at Herfølge og Brøndby standa á jøvnum í stigum, so verður Brøndby meistari, tí teir hava væl betri málmun enn Herfølge.

Tað er sjáldsamt, at oddaliðið í superliguni bara hevur pluss trý í málmuni. Málmunurin hjá Brøndby er pluss tjúgu.

AaB er á triðja plássinum við 48 stigum, AB hevur 45 stig og Silkeborg hevur 44 stig. Herfølge skal til Silkeborg komandi mikukvøld. Tað verður ikki ein lættur dystur, tí Silkeborg hevur framvegis eitt pláss í UEFA Cup at spæla um.

JH



# Anja Andersen til Føroya

*Fríggjadagin kemur heimskenda danska hondbóltskvinnan, Anja Andersen, til Føroya á vitjan. Tað er formula.fo, sum, saman við hondbóltsfeløgunum í Havn, hevur fingið vitjanina í lag*



*Hóast tendringin til tíðir er dekan ov góð, so er Anja Andersen uttan iva millum fremstu kvinnuligu leikararnar í hondbóltssøguni*

Sveinur Tróndarson

Fríggjadagin fáa føroyingar forkunnuga hondbóltsvitjan. Tá kemur danska hondbóltsstjørnan Anja Andersen til Føroya á vitjan í tveir dagar, sum gestur hjá formula.fo í Havn. Ferðin hevur formula.fo fingið í lag í samstarvi við Fujitsu-Siemens, sum er høvuðsstuðul hjá Slagelse Forenede Håndboldklub, har Anja Andersen nú er ítróttarstjóri.

Tað munnu vera tey fægstu, sum hava eitt sindur av áhuga fyri hondbólti, sum ikki kenna til og hava sína hugsan um Anju Andersen.

Hon var í fleiri ár týdningarmikil partur av tí framúr góða danska landsliðnum, sum endaði við at vinna bæði OL-, EM- og HM-kappingina. Hóast tendringin kanska er í betra lagi, so er eingin ivi um, at her er talan um ein hondbóltsleikara, sum tá hon var upp á tað besta, mundi teljast millum teir bestu heimurin nakrantíð hevur fostrað.

Skráin fyri túrin hjá Anju Andersen er tann, at hon fríggjadagin fer at skipa fyri einum minni hondbóltsskúla í Havn. Har fáa eini 75 børn høvið til at venja saman við heimsstjørnuni, men hóast tiltakið verður í Havn, so er eisini ætlanin, at børn úr øðrum hondbóltsfeløgum enn teimum í Havn, sleppa at vera við í venjingini.

**Hava hondbóltsskúla**

Anja hevur havt hondbóltsskúlar í Danmark í fleiri ár og áhugin hevur verið sera stórur. Tað eru sjálvsagt hennara serligu gávur, sum hondbóltsleikari, sum draga børnini til, men eisini tað, at hon hevur traditionellar mátar at venja uppá. Hon leggur dent á, at tað skal vera stuttligt at spæla hondbólt, og spælið skal eisini vera stuttligt at hyggja at hjá áskoðarunum. Tí roynir hon at venja ungu leikararnar serligar fintur og annað skemtiligt. Eydnast hesin hondbóltsskúlin væl, so er ikki óhugsandi, at Anja eisini í framtíðini fer at skipa fyri hondbóltsskúlum í Føroyum, sigur Áki Johansen, frá formula.fo.

Leygardagin verður Anja Andersen at hitta í SMS. Millum klokkan ellivu og eitt leygardagin fer Anja at hitta børn og skriva autografar. Hetta hevur hon gjørt mangar ferðir í Danmark og tað hevur drigið nógv fólk. Seinni leygardagin er ætlanin, at hon skal støkka inn á gólvi til venjingina hjá U-20 kvinnulandsliðnum, og ætlanin er, at hon skal verða við í venjingini í ein tíma ella so.

Um kvøldið bjóðar formula.fo til ein døgverða í Kirkjubø fyri ferðalagnum úr Danmark, sum umframt Anju, m. a. telur stjóran í Fujitsu Siemens í Danmark, Karsten Madsen. Ferðalagið fer avstað aftur úr Føroyum sunnudagin.

## Brøndby misti takið

*Brøndby mátti taka til takkar við javnleiki móti Silkeborg mánakvøldið*

Jákup Mørk

Úrslitið hevur við sær, at Jákup Mikkelsen og Herfølge nú eru trý stig framman fyri Brøndby, nú bert trý umfør eru eftir í donsku superliguni.

Sostatt tykist tað vera alt meira sannlíkt, at lítla felagið, sum av mongum varð mett at noyðast eina deild niður, endar kappingarárið á ovastu rók, og harvið stendur við møguleikanum at spæla seg fram til UEFA Champions League komandi ár.

# Ingibjørg setti nýtt met

*Ingibjørg Poulsen setti leygardagin nýtt føroyskt met í kúluvarpi fyri kvinnur, tá hon kastaði 10,80 m. Annars var kappingin merkt av lítlari luttøku í fleiri av kappingunum.*




*Ingibjørg Poulsen betraði um metið í kúluvarpi*

***Mynd:SJ***

Úrslit frá opnari kapping í frælsum ítrótti á Svangaskarði:

**Kúluvarp, kvinnur:**
1. Ingibjørg Poulsen, Bragdið10,80 m.
2. Randi Kúrberg, Bragdið 8,48 m

**Longdarlop, gentur:**
1. Súsanna Dal Jákupsdóttir, Bragdið 2,69 m
2. Kristianna Dal Jákupsdóttir, Bragdið 1,88 m

**Longdarlop, dreingir:**
1. Jóan Karl Joensen, Kollafjørð 3,62 m
2. Øssur Debes Eiriksfoss, Tórshavn 3,50 m
3. Pætur Debes Johannesen, Kollafjørð 3,01 m
4. Bjørn Reiner, Tórshavn 3,01 m
5. Teitur Nielsen, Tórshavn 2,99 m
6. Olivur Debes Eiriksfoss, Tórshavn 2,90 m

**100 m renning, gentur:**
1. Súsanna Dal Jákupsdóttir, Bragdið 19,5 sek
2. Kristianna Dal Jákupsdóttir, Bragdið

**100 m renning, dreingir:**
1. Jóan Karl Joensen, Kollafjørð 15,0 sek
2. Øssur Debes Eiriksfoss, Tórshavn 16,1 sek
3. Teitur Nielsen, Tórshavn 17,8 sek
4. Pætur Debes Johannesen, Kollafjørð 17,9 sek
5. Bjørn Reinert, Tórshavn 18,0 sek
6. Olivur Debes Eiriksfoss, Tórshavn 18,1 sek
7. Teitur B. Jacobsen, Tórshavn

**800 m renning, gentur:**
1. Súsanna Dal Jákupsdóttir, Bragdið 3.18,8 min




*Jóan Karl Joensen gjørdist stóri vinnarin hjá monnum, har hann vann tríggjar greinar*

***Mynd: SJ***

**800 m renning, dreingir:**
1. Jóan Karl Joensen, Kollafjørð 3.02,0 min
2. Øssur Debes Eiriksfoss, Tórshavn 3.06,9 min
3. Pætur Debes Johannesen, Kollafjørð 3.14,6 min
4. Bjørn Reinert, Tórshavn 3.18,3 min

**800 m renning, kvinnur:**
1. Tordis Debes, Bragdið 2.34,1 min
2. Sunnuva Bjarnastein, Bragdið 2.42,7 min

**800 m renning, menn:**
1. Evald við Garð, Dropin 2.10,6 min
2. Guttorm Sørensen, Treysti 2.15,3 min

**5000 m renning, kvinnur:**
1. Ann Thomsen, Bragdið 22,45 min
2. Rannvá Hanusardótti 23,22 min

**5000 m renning, menn:**
1. Guttorm Sørensen, Treysti 16,48 min
2. Jónálvur Johannesen, Dropin 18,15 min
3. Niels J. Jakobsen, Bragdið 19,20 min

SJ